VB-B68:

# Kreppan skal loysast

**VB tykist í løtuni vera fullkomuliga fyri ongum, og so er spurningurin, hvørt hetta fer at gagna toftamonnum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*



*Vágbingar hava alt at vinna og einki at tapa, nú teir skulu royna at reisa seg úr innanhýsis kreppunil, og tað kann vera vandamikið fyri gestirnar av Toftum*

Hýrurin er í botni í Vági í hesum døgum. Ein meira enn lúrandi kreppa tykist vera í fyrstaliðshópinum hjá VB, spælarar hava hótt við at rýma og fara í onnur feløg, og hetta hevur eisini verið eyðsæð í spælinum á vøllinum.

Hóskvøldið fingu teir rættiliga bank í Gundadali ímóti HB, og hóast tað var talan um dyst í steypakappingini, so skerst ikki burtur, at slík tap seta síni merki í sjálvsálitið hjá leikarunum.

### Álopsparturin skerdur

Tí er lítið at ivast í, at VB í løtuni er til at tosa við á heimavølli, og so er spurningurin, hvørt toftamenn klára at gera sær dælt av hesum.

Bæði liðini vóru tapandi hálvfinalistar hóskvøldið, men mett frá avrikunum tá, so eru tað tó toftamenn, sum eru munandi betri fyri, tó at teir hava eina hálva kreppu í álopspartinum.

Møguliga er Marcello tó í ferð við at loysa hesa. Hann kom á vøllin í seinna hálvleiki móti NSÍ og skoraði eitt vakurt mál, so møguliga verður hann við frá byrjan hesaferð.

Tað verður Hans Fróði Hansen helst eisini, hóast hann hevur ein minni skaða at dragast við, men hinvegin sær verri út hjá Jan Petersen. Hann noyddist av vøllinum hóskvøldið, og í skrivandi løtu er sera ivasamt, um hann fær tikið lut í nøkrum dysti sunnudagin.

### Svara teir aftur

Hjá VB eru tað ikki so nógv skaðar, sum gera um seg, men sum kunnugt er talan um mannfall kortini. Kanska verður størsti spurningurin hesaferð, hvussu álopsparturin á liðnum fer at síggja út. Har hevur Robert Ciezlewicz havt sera ilt við at vinna sær pláss í verjukendu útgangsstøðuni hjá liðnum, men tað er tó ikki óhugsandi, at hann fer at fáa møguleikan frá byrjan á heimavølli.

Og so er heldur ikki óhugsandi, at VB brádliga fer at reisa seg. Teir hava mangan áður treiskast, tá mest hevur staðið á, og ivaleyst eru toftamenn eisini somikið royndir, at teir ikki á nakran hátt rokna við nakrari lættari uppgávu á Eiðinum, tí tað er hon sjáldan.

NSÍ-TB:

# Oddasessurin skal haldast við Løkin

**Runavíkingar fegnast sjálvandi um finalusessin, men fyrst og fremst ræður um at halda fast í oddinum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað er ikki eiti á, at fótbóltshýrurin í Runavíkini er góður í løtuni. Runavíkingar vunnu seg fyri viku síðani upp í oddin í landskappingini, og hóskvøldið tryggjaðu teir sær sess í steypafinaluni, sum verður á ólavsøku.

### Landskapping fyrst

Tað er tó fyrst og fremst sessurin á stigatalvuni, sum runavíkingarnir nú skulu hugsa um, og á pappírinum tykist tað ikki vera nøkur ógjørlig uppgáva at halda fast um hendan, nú TB kemur á vitjan.

Til dystin hevur NSÍ mest sum allar mans tøkar. Jónstein Petersen og Sjúrður Jacobsen vóru báðir burtur frá hóskvøldið, tí teir høvdu leikbann, men teir verða báðir við aftur nú, og so er spurningurin, hvussu Jógvan Martin Olsen fer at blanda kortini. Seinast lat hann Christian Høgna Jacobsen loysa Sjúrð av á bakkinum, og so er spurningurin, hvørt hann heldur fast um hetta, og um ikki – so um Christian Høgni fær annað plássið í álopinum, nú bæði Sonni L. Petersen og Óli Hansen hava skorað tveir dystir upp í slag. Tað má so í øllum førum sigast at vera okkurt slag av lukssus-trupulleika, tá so er. Einasti trupulleikin hjá liðnum tykist vera skaðin hjá Djóna N. Joensen, sum helst fer at halda honum uttan fyri komandi tvær vikurnar.

So er spurningurin bara, hvussu runavíkingar fara at megna at umstilla seg til nýggjan dyst, bert tríggjar dagar eftir hálvfinaluna. Hetta verður eisini fimti dysturin hjá leikarunum í juni mánaði, so tað er skilligt, at dysturin verður leiktur sunnudagin og ikki leygardagin, so sum tað ofta verður gjørt við stevnudystum.

Hjá TB tykjast allir mans at vera tøkir til dystin, og eftir at formkurvan hevur sveiggjað seg nakað væl uppeftir síðani venjaraskiftið, verður spennandi at síggja, hvørt teir fara at gera nakrar skreytir, og á tann hátt spilla runavíkingunum eystanstevnuna.



*Runavíkingar hava ovmikið at fegnast um í hesum døgum, men hvíldin millum dystirnar er stutt, og tí ræður um at fáa armarnar niður aftur*

## Soleiðis plagar at ganga

Hagtølini hetta vikuskiftið hava ikki so greiðar ábendingar, sum tey onkuntíð hava havt, tó at tey so mikið sum so, at B68 vanliga hevur tað trupult í Vági eins og TB hevur søguliga góð úrslit í Runavík. Enn hava hagtølini tó ongan tíð avgjørt nakran dyst, og at tey ikki kunnu nýtast til so nógv var dysturin hjá NSÍ í Havn fyri viku síðani eitt gott dømi um.

Talvan sýnir, hvussu mótstøðuliðini sunnudagin hava staðið seg, tá tey hava hitst í bestu deildini seinastu 10 árini

*-jm*

| | '01 | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | '92 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B36-EB/S | 5-1 | - | - | - | - | - | - | 3-1 | - | - | 2-0-0 | 8-2 |
| NSÍ-TB | - | - | - | 1-0 | - | - | 2-3 | 2-2 | - | 1-2 | 1-1-2 | 6-7 |
| VB-B68 | 1-1 | 4-1 | 0-2 | 3-1 | 3-0 | 2-0 | 2-1 | - | 2-4 | 0-1 | 5-1-3 | 17-11 |
| GÍ-KÍ | 5-1 | 0-0 | 2-1 | 2-2 | 4-2 | 1-2 | 5-1 | 0-2 | 3-1 | 1-0 | 6-2-2 | 23-12 |
| Skála-HB | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-0 | 0-0 |



Bólkur G:

# Italia slapp við skrekkinum

**Tað eydnaðist ikki Italia at vinna seinasta dystin í bólkaspælinum, men við eini hjálpandi hond frá Ecuador komu teir ljósabláu tó víðari í kappingini**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var um reppið, at Italia hósdagin fór sama veg, sum Frakland og Argentina longu eru farin.

Fyri at vera vísir í at koma víðari úr bólkaspælinum, so skuldu italiumenn vinna dystin móti Mexico, og tað mundu tey flestu eisini rokna við fór at bera til. Eisini hóast kappingin higartil hevur sýnt, at stóru favorittarnir als ikki skulu kenna seg so tryggjar.

Tað var eisin um reppi, at tað gekk galið hjá Italia. Eftir góðum hálvum tíma skey mixicanski Borgetti sítt næsta mál í HM-kappingini, og so var trýstið av álvara lagt á Italia.

Alessandro Del Piero kom á vøllin í seinna hálvleiki, og hann vísti seg at verða frelsandi eingilin hja Italia, tá hann fimm minuttir fyri leiklok gjørdi útjavnandi málið.

### Kroatia kiksaði

Javnleikurin hjá Italia skuldi nevnliga vísa seg at vera nóg mikið, tí í hinum dystinum í bólkinum snávaði Kroatia, tá teir taptu 1-0 fyri Ecuador.

Ein sigur til kroatar í hesum dystinum hevði annars tryggjað teimum pláss millum tey seinastu 16, um Italia ikki fekk fult í sínum dysti, men Kroatia helt ikki sín part av fortreytunum, og tískil kundi tað vera tað sama, hvussu dysturin hjá Italia endaði.

Málið hjá Ecuador skeyt Edmundo Mendez, og tó at Ecuador ikki kom víðari í kappingini, so var talan um eina søguliga løtu. Hetta er nevnliga fyrsta málið, sum Ecuador hevur fingið í einum HM-endaspæli.

**Úrslit:**
**Ecuador-Kroatia 1-0 (0-0)**
1-0: Edmundo Mendez

**Mexico-Italia 1-1 (1-0)**
1-0: Jared Borgetti, 34
1-1: Alessandro Del Piero, 85

## HM hetta vikuskiftið

| | | |
|---|---|---|
| 15.06 | 07.30 | Týskland-Paraguay |
| 15.06 | 12.30 | Danmark-Ongland |
| 16.06 | 07.30 | Svøríki-Senegal |
| 16.06 | 12.30 | Spania-Írland |
| 17.06 | 07.30 | Mexico-2'ari D |
| 17.06 | 12.30 | Brasilia-2'ari H |

## Máltindurin, HM

| | | |
|---|---|---|
| Miroslav Klose | Týskland | 5 |
| Jon Dahl Tomasson | Danmark | 4 |
| Rivaldo | Brasilia | 3 |
| Ronaldo | Brasilia | 3 |
| Christian Vieri | Italia | 3 |
| Pedro Pauleta | Portugal | 3 |
| Papa Bouba Diop | Senagal | 3 |
| Raul González | Spania | 3 |
| Marc Wilmots | Belgia | 2 |
| Rónald Gomez | Costa Rica | 2 |
| Robbie Keane | Írland | 2 |
| Junichi Inamoto | Japan | 2 |
| Jared Borgetti | Mexico | 2 |
| Nelson Cuevas | Paraguay | 2 |
| Fernando Hierro | Spania | 2 |
| Fernando Morientes | Spania | 2 |
| Henrik Larsson | Svøríki | 2 |
| Hasan Gokhan Sas | Turkaland | 2 |

B71-HB 1-2 (1-0):

# Kvinnurnar eisini í finaluni

**HB kvinnurnar gjørdu monnunum kynstrið eftir, og skulu spæla steypafinalu móti KÍ**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

HB skuldi á Sandi verja 1-0 leiðsluna, sum liðið hevði frá fyrra dystinum millum liðini. Tað ferðina var talan um ein heldur linligan dyst, har gestirnir fyri tað mesta vardu, fyri so at dúva upp á kontraálop.

Taktikkurin hjá B71 var ikki stórt øðrvísi hesaferð, men tað var tó um reppið, at hetta bar úrslit við sær hóskvøldið. Tað eydnaðist nevnliga B71 at koma á odda, tá HB málverjin og ein verjuleikari misskiltu hvønn annan, soleiðis at álopsleikari hjá B71 brádliga slapp ímillum.

1-0 var eisini støðan í hálvleikinum, men hevði B71 rokna við at halda fast um hetta, so høvdu tær ikki roknað við Eyðfríð Kristiansen. Fyrst sendi hon fríspark beinleiðis í netið, og tá hon nakað seinni fór einsamøll ígjøgnum sandoyarverjuna og setti bóltin framvið málverjanum, stóð tað greitt, at HB aftur í ár skal spæla steypafinalu.

Eins og í fjør, so verður dysturin hesaferð móti KÍ, men tað kann ikki roknast við, at HB verður eins væl fyri við fólki, sum tær vóru fyri einum ári síðani.

## Ivi um Tomasson

Danski toppskjúttin í HM-kappingini, Jon Dahl Tomasson, verður møguliga ikki við, tá Danmark leygardagin skal spæla 1/8-finalu ímóti Onglandi.

Tomasson hevur síðani dystin móti Fraklandi havt pínu í lærkrikanum, og úr donsku leguni verður sagt, at tað einasta, sum hjálpir í slíkum førum, er tíð. Og tað hava danir neyvan tíð til í løtuni.

Annars tykist áhugin fyri danska landsliðnum at vera mest sum eksploderaður, síðani sigurin á Fraklandi. Sostatt eru 850 danir afturat farnir til Niigata, har dysturin móti Onglandi verður leiktur.

## Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 6 | 4 - 2 - 0 | 14 | 3 | 11 | 14 |
| 2 | NSÍ | 7 | 4 - 2 - 1 | 12 | 10 | 2 | 14 |
| 3 | B68 | 7 | 3 - 3 - 1 | 11 | 9 | 2 | 12 |
| 4 | B36 | 6 | 3 - 1 - 2 | 18 | 10 | 8 | 10 |
| 5 | GÍ | 6 | 3 - 1 - 2 | 9 | 9 | 0 | 10 |
| 6 | KÍ | 6 | 3 - 0 - 3 | 17 | 10 | 7 | 9 |
| 7 | VB | 6 | 2 - 2 - 2 | 3 | 3 | 0 | 8 |
| 8 | EB/Streymur | 6 | 1 - 1 - 4 | 5 | 9 | -4 | 4 |
| 9 | TB | 6 | 1 - 1 - 4 | 5 | 22 | -17 | 4 |
| 10 | Skála | 6 | 0 - 1 - 5 | 3 | 12 | -9 | 1 |

**Bólkur A**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Danmark | 3 | 2 - 1 - 0 | 5 | 2 | 3 | 7 |
| 2 | Senegal | 3 | 1 - 2 - 0 | 5 | 4 | 1 | 5 |
| 3 | Uruguay | 3 | 0 - 2 - 1 | 4 | 5 | -1 | 2 |
| 4 | Frakland | 3 | 0 - 1 - 2 | 0 | 3 | -3 | 1 |

**Bólkur B**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Spania | 3 | 3 - 0 - 0 | 9 | 4 | 5 | 9 |
| 2 | Paraguay | 3 | 1 - 1 - 1 | 6 | 6 | 0 | 4 |
| 3 | Suður Afrika | 3 | 1 - 1 - 1 | 5 | 5 | 0 | 4 |
| 4 | Slovenia | 3 | 0 - 0 - 3 | 2 | 7 | -5 | 0 |

**Bólkur C**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Brasilia | 3 | 3 - 0 - 0 | 11 | 3 | 8 | 9 |
| 2 | Turkaland | 3 | 1 - 1 - 1 | 5 | 3 | 2 | 4 |
| 3 | Costa Rica | 3 | 1 - 1 - 1 | 5 | 6 | -1 | 4 |
| 4 | Kina | 3 | 0 - 0 - 3 | 0 | 9 | -9 | 0 |

**Bólkur D**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Suður Korea | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 1 | 2 | 4 |
| 2 | USA | 2 | 1 - 1 - 0 | 4 | 3 | 1 | 4 |
| 3 | Portugal | 2 | 1 - 0 - 1 | 6 | 3 | 3 | 3 |
| 4 | Póland | 2 | 0 - 0 - 2 | 0 | 6 | -6 | 0 |

**Bólkur E**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Týskland | 3 | 2 - 1 - 0 | 11 | 1 | 10 | 7 |
| 2 | Cameroon | 3 | 1 - 2 - 0 | 5 | 2 | 3 | 5 |
| 3 | Írland | 3 | 1 - 1 - 1 | 2 | 3 | -1 | 4 |
| 4 | Saudi Arabia | 3 | 0 - 0 - 3 | 0 | 12 | -12 | 0 |

**Bólkur F**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Svøríki | 3 | 1 - 2 - 0 | 4 | 3 | 1 | 5 |
| 2 | Ongland | 3 | 1 - 2 - 0 | 2 | 1 | 1 | 5 |
| 3 | Argentina | 3 | 1 - 1 - 1 | 2 | 2 | 0 | 4 |
| 4 | Nigeria | 3 | 0 - 1 - 2 | 1 | 3 | -2 | 1 |

**Bólkur G**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mexico | 3 | 2 - 1 - 0 | 4 | 2 | 2 | 7 |
| 2 | Italia | 3 | 1 - 1 - 1 | 4 | 3 | 1 | 4 |
| 3 | Kroatia | 3 | 1 - 0 - 2 | 2 | 3 | -1 | 3 |
| 4 | Ecuador | 3 | 1 - 0 - 2 | 2 | 4 | -2 | 3 |

**Bólkur H**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Japan | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 2 | Russland | 2 | 1 - 0 - 1 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 3 | Belgia | 2 | 0 - 2 - 0 | 3 | 3 | 0 | 2 |
| 4 | Tunis | 2 | 0 - 1 - 1 | 1 | 3 | -2 | 1 |